LÖGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

# Upplýsingarskjal um persónlig áhugamál hjá landsstýrinum

Til tess at tryggja gjøgnumskygni, verða landsstýrisfólk biðin um at upplýsa um síni privatu áhugamál og fíggjarlig viðurskifti. Endamálið er at byrgja upp fyri gegnistrupulleikum og tryggja, at borgarin hevur álit á, at embætisførslan ikki er ávirkað av ósakligum áhugamálum.

Upplýsingarskjalið um áhugamál verður dagført eina ferð um árið. Um týðandi broytingar í nevndu viðurskiftunum eru, er tað skyldan hjá einstaka landsstýrisfólkinum at upplýsa løgmanni um hesar viðurskifti.

Viðkvæmir upplýsingar fevndir av § 2 í persónsupplýsingarlógini, eitt nú átrúnaðarlig viðurskifti, skulu ikki upplýsast.

Kunning um áhugamálsviðurskifti hjá løgmanni og landsstýrisfólkum er tøk á heimasíðuni hjá landsstýrinum: www.landsstyrid.fo

Upplýsingar um ognarviðurskifti og persónlig áhugamál hjá hjúnafelaga/maka skulu latast løgmanni fyri seg.

## Navn og embæti

Bárður Nielsen, løgmaður

## Størv

Størv seinastu fimm árini, eisini ólønt størv, álitissessir og líknandi. Somuleiðis størv, sum ein hevur farloyvi úr. Starvsheiti, arbeiðsgevari og tíðarskeið skulu upplýsast.

- Løgtingsmaður 2002-2008 og 2011-2019
- Fíggjarstjóri P/F Nema/Hey 2010-2019
- Stjóri Smi Stóratjørn 2007-2019
- Nevndarformaður P/F Skemman, Sp/F Aspo, Sp/f Kvettið, Sp/f 55555
- Nevndarlimur P/F Jákup á Dul, P/F Smi Stóratjørn
- Fyriskipari av Bátastevnuni í Vestmanna

## Egið virki

Navn á virki og virkisslag skulu upplýsast

- Fa Bárður Nielsen, Ráðgeving og Bókhald

## Vinnulig áhugamál

Upplýsingar um íløgur, virðisbrøv, vinnuligar ognir og onnur fíggjarlig áhugamál

- Partabrøv í D/S Norden A/S 173 stk.

- Partabrøv í Vestas A/S 40 stk.

## Avtalur við fyrrverandi ella komandi arbeiðsgevarar

Avtalur um framtíðar starvssetan og líknandi.
Arbeiðsgevarar, og hvat møguligar avtalur fevna um, skulu upplýsast.

- Ongar

## Limaskapir í feløgum og felagsskapum

- Limur í Vestmanna Ítróttarfelag
- Limur í Vestmanna Byrsufelag
- Limur í Norðurstreymoyar Sambandsfelag
- Limur í Fólkakirkjuni